Starvslýsing

Heimatænastan

## Økisterapeutur til Heimatænastuna í Suðurstreymoy

Søkt verður eftir økisterapeuti í farloyvisstarv frá 1. januar 2007 til 31. juli 2007.

**Í mun til tann einstaka brúkaran skal økisterapeuturin millum annað:**
- meta um førleika og tørv á tiltøkum
- veita vegleiðing til starvsfólk og avvarandi í at vera um brúkaran
- gera uppfylgjandi arbeiði í samband við útskrivan frá sjúkrahúsi

**Vit sóknast eftir einum ergo- ella fysioterapeuti, sum**
- hevur arbeiðsroyndir
- hevur evni til at arbeiða sjálvstøðugt

Meiri fæst at vita um starvið við at venda sær til Metu av Fløtum, økisleiðara, á tlf. 317249.

**Lønar- og setanartreytir:**
Lønar- og setanarviðurskifti sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og viðkomandi yrkisfelag.

**Umsókn:**
Umsóknir við avriti av prógvum v.m. skulu sendast til:

Nærverkið
Heimatænastan
Stílað: Meta av Fløtum, økisleiðari
Skálatrøð 14
FO-100 Tórshavn

**Umsóknarfreistin er 27. desember 2006**

Les meira um starvið á www.naerverk.fo

Heimatænastan

## Ítrivsvegleiðari til Eldrasambýlini í Suðurstreymoy

Til eldrasambýlið Oman Hoydalar og eldrasambýlið í Kollafirði er eitt starv sum ítrivsvegleiðari 40 t/vikuna leyst at søkja frá 1. januar 2007 ella eftir nærri avtalu.

**Førleikakrøv:**
- Útbúgving sum ítrivsvegleiðari, ergoterapeutur ella heilsurøktari

Arbeiðstíðin er dagtímar mánadag til fríggjadag.

Meiri fæst at vita um starvið við at venda sær til Metu av Fløtum, økisleiðara, á tlf. 317249.

**Lønar- og setanartreytir:**
Lønar- og setanarviðurskifti sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og viðkomandi yrkisfelag.

**Umsókn:**
Umsóknir við avriti av prógvum v.m. skulu sendast til:

Nærverkið
Heimatænastan
Stílað: Meta av Fløtum, økisleiðari
Skálatrøð 14
FO-100 Tórshavn

**Umsóknarfreistin er 27. desember 2006**

Les meira um starvið á www.naerverk.fo

Trivnaðartænastan

## Pedagogar til Trivnaðartænastuna

Søkt verður eftir tveimum pedagogum til sambýlir í Tórshavn.

Talan er um sambýlini á Fugloyarvegi 9, Grønlandsvegi 59 og í Svanga 24, sum hava felags leiðslu.

Tað eina starvið er fast starv, og hitt starvið er farloyvisstarv í tíðarskeiðnum 01.01.2007 – 31.10.2007.

Vit søkja eftir fólki við útbúgving sum pedagogur. Um eingin pedagogur søkir, kunnu størvini verða sett við hjálparfólki.

**Vit bjóða**
Tvey spennandi og avbjóðandi størv, sum millum annað fevna um at vegleiða húsfólkini í øllum tí, sum tey hava tørv á, og at menna hvønn einstakan til at húsast saman í felagsskapi.

**Lønar- og setanartreytir:**
Størvini verða sett 1. januar 2007 ella eftir nærri avtalu.
Talan er um 30 tímar um vikuna.
Arbeiðstíðirnar eru skiftandi, og roknast skal við morgun-, kvøld-, náttar- og vikuskiftisarbeiði.
Størvini verða sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Pedagogfelag.

Vilt tú vita meira um størvini, ert tú vælkomin at venda tær til leiðaran á tlf. 215424.

**Umsókn:**
Umsókn við próvskjølum, viðmælum og C.V. skulu sendast til:

Sambýlið Fugloyarveg 9
Stílað: Eydnu Nicolajsen, leiðara
100 Tórshavn

**Umsóknarfreistin er 27. desember 2006**

Les meira um størvini á www.naerverk.fo

*Nærverkið kemur út til borgaran at veita tænastur, ið fevna um eitt nú stuðul, tilboð til borgarar við serligum tørvi og tænastur til barnafamiljur og eldri. Nærverkið er sjálvstøðugur stovnur undir Almanna- og heilsumálaráðnum. Umframt Meginskrivstovuna, ið hevur yvirskipaðu leiðsluna, eru fýra deildir: Heimatænastan, Trivnaðartænastan, Stuðulstænastan og Barnatænastan. Nærverkið leggur áherðslu á nærleika, umsorgan og professionalismu í øllum lutum. Umleið 1400 fólk starvast í Nærverkinum.*

NÆRVERKIÐ

Meginskrivstovan, Postsmoga 3037, 110 Tórshavn, Tel 30 40 20, Faks 30 40 10, meginskrivstovan@naerverk.fo

sansir.fo

**www.naerverk.fo**



*Landið kundi lært av Tórshavnar kommunu, heldur Heðin Mortensen*

# Landið kundi lært av okkum

**– Um landið hevði dugað eins væl við fíggjarstýringini sum Tórshavnar Kommuna, so hevði staðið ótrúliga væl til í Føroyum. Tað sigur borgarstjórin í størstu kommununi í landinum, um atfinningarnar sum Búskaparráðið setir fram móti fíggjarstýringini hjá kommununum**

BÚSKAPUR
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

Heðin Mortensen er greiður í síni talu og orðum, tá vit spyrja hann um atfinningarnar sum Búskaparráðið setir fram móti fíggjarstýringini hjá kommununum.

Í einum samandrátti, sum Búskaparráðið hevur gjørt av frágreiðingini, verður sagt: "Ein enn størri trupulleiki er tann vantandi fíggjarstýringin av kommunubúskapinum."

Hesum hevur borgarstjórin í landsins størstu kommunu, Heðin Mortensen, ikki serliga nógv til yvirs fyri.

– Eg kann siga stutt og greitt, at um landið hevði stýrt eins væl fíggjarliga sum vit í Tórshavnar Kommunu, so hevði staðið væl til í Føroyum, sigur Heðin Mortensen avgjørdur á málinum.

Nakað av atfinningum hava verið frammi mótvegis fíggjarætlanini hjá Tórshavnar Kommunu fyri komandi ár, har ein nógvar stórar og kostnaðarmiklar íløgur verða framdar.

– Vit skylda ongar pengar. Vit hava eina góða og effektiva umsiting, og tær íløgur vit nú gera, eru neyðugar, slær borgarstjórin í Tórshavnar Kommunu fast.

– Her er talan um íløgur, vit hava fingið álagt at gera, millum annað frá løgtinginum.

Heðin Mortensen vísir á, at tað í hansara verð snýr seg um raðfestingar, tá pengar verða játtaðir.

– Tað snýr seg um prioriteringar og hvat fæst fyri pengarnar. Í Tórshavnar Kommunu fæst service fyri pengarnar, og eg finni meg ikki í, um onkur førir fram at vit ikki stýra væl, sigur Heðin Mortensen, sum heldur at landið brúkar alt ov nógvan pening til hørð virði.

Um spurningin um eina felags fíggjarrammu, sigur Heðin Mortensen, at tað sjálvandi hevði verið gott um land og kommunur tosaðu betur saman, men at tað sum nú er, er tað altíð landið sum kemur við áleggingum til kommunurnar, eftir at fíggjarætlanirnar hjá kommununum eru gjørdar.